

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo

# Próvtøka á Vinnuháskúlanum



Fríggjadagin 3. september 2010 fingu 19 maskinistar handað prógv á Vinnuháskúlanum í Havn.

**Maskinistarnir eru:** Angus Winther Olsen, Regin Olsen, Bárður Poulsen, Hilmar Sveinbjørnsson, Jan Hansen, Virgar Zachariasen, Jan Thomsen, Guttorm Eliassen, Tórolvur Samuelsen, Jóannes Jespersen, Svend Magni Djurhuus, Einar Dam, Jan Ljósheim, Helgi Suni Kristiansen, Arnhold Rasmussen, Dan Andreasen, Høgni R. V. Niclasen, Leif Klein og Leivur Jarnfoss.

**Virðislønir ið vóru latnar:** 1. Tórolvur Samuelsen fekk mátitól frá Maskinmeistarafelagnum, 2. Høgni L. V. Niclasen fekk kikara frá Eik Banka og 2. Arnhold Rasmussen fekk barometur og klokku frá Trygd.



## Down Syndrom dagur

Leygardagin 25. september frá kl. 14 til 18 verður Down Syndrom dagur í Bowlinghøllini í Leirvík.

Tveir av fyrireikarunum, Jastrid Weihe og Elin Noru Reines, siga í tíðindaskrivi, at nú halda tey at tíðin er komin til at hittast aftur. Eisini ynskja tey at síggja øll tey nýggju, sum ikki hava verið við fyrr. Tiltakið verður í Bowlingahøllini í Leirvík leygardagin 25. september 2010 frá kl. 14 til 18.

Fyrireikararnir siga, at tey sum hava hug at vera við, mugu siga frá í seinasta lagi hósdagin 23. september. Tekning fer fram hjá Jastrid Weihe tel. 228077 ella Elin Noru Reines tel. 211382.

# Móttøka í nýmótans neysti



*Nýggja VÍF kappróðrarneystið í Vestmanna*

*Mynd: Birgir Waag Høgnesen*

Móttøka verður í nýggja kappróðrarneystinum hjá VÍF í Vestmanna leygardagin 11. september.

Í sambandi við at neystið er endaliga liðugt, verður almenn móttøka fyri øllum áhugaðum frá kl. 17-19, har høvi verður at síggja kappróðrarbátarnar, venjingarhølini og veitsluhøllina, ið kann brúkast til ymisk tiltøk so sum brúdleyp, føðingardagar og samkomur av ymsum slag. Ætlanin er at gera eina venjingarmiðstøð við nýmótans venjingarútgerð, har ið øll hava møguleikan at halda seg í form undir góðum umstøðum.

VÍF hevur í mong ár havt ætlanir um at savna øll steypini fyri t.d. hondbólt, kappróður og badminton hjá felagnum á einum stað, og verður tað nú veruleiki. Í sambandi við móttøkuna verður skipað fyri steypamóttøku, soleiðis at steypini, sum í løtuni standa heima hjá teimum ymisku ítróttarfólkunum, kunnu latast inn hendan dagin.




## Andlát

Kunngjørt verður fyri ætt,
vinum og kenningum, at

**Áslakkur B. Poulsen**

andaðist 9. september í Greve, Danmark.

Jarðarferðin verður týsdagin 14. september
kl. 11.00 úr Kildebrønde kirke í Greve.

*Vegna tey avvarðandi*
**Marjun og Ellen**